


## Matur út úr húsinum

Nú hevur tú møguleika at bíleggja mat út úr húsinum – eisini til størri og minni veitslur.

Sí okkara matskrá á heimasíðuni, vel okkurt leskiligt og ring á tlf. 211109 ella 311109.






RESTAURANT TOSCANA

NÓLSOYAR PÁLS GØTA 13 · 100 TÓRSHAVN · TLF. 311109 · WWW.TOSCANA.FO


# Hægri handilsskúla á netinum



Seinastu fýra árini hevur Føroya Handilsskúli á Kambsdali bjóðað út FHS fjarlestur. Nú verður tilboðið víðkað til eisini at umfata HH lærugreinar. Í fyrstu atløgu verður møguligt at taka lærugreinirnar virkisbúskap og sølubúskap á b-stigi.

FHS stakgreinalestur sum fjarlestur hevur verið stak væl móttikin og úrslitini hava verið góð, og tískil hevur skúlin saman við Mentamálaráðnum avgjørt at víðka um møguleikarnar.

Handilsskúlin sigur í tíðindaskrivi, at fyrstu fýra árini hava víst, at stórur tørvur er á fjarlestrartilboðum. Millum 30 og 40 hava luttikið í hvørjari lærugrein, og úrslitini hjá nemingunum hava higartil ligið nakað omanfyri miðal.

Lesturin er farin fram sum blandingslestur. Dagliga frálæran er farin fram umvegis telduna og vælvirkandi First Class skipanina hjá KT-deplinum. Harafturat hava nemingarnir havt høvið at hittast saman við lærarunum tvær ferðir hvørja lestrarhálvu.

Treytin fyri upptøku á FHS er nøktandi 9./10. floksprógv og fyri HH nøktandi FHS prógv ella samsvarandi. Tað er ein fyrimunur at hava viðkomandi starvsroyndir og kunnleika til teld, sigur Handilsskúlin í tíðindaskrivi. Umsóknarfreistin er 12. juni

**DH**


## Søkt verður eftir kokki til Krásadeildina í Miklagarði

Søkt verður eftir kokki til Krásadeildina í Miklagarði at arbeða 40 tímar um vikuna, tó ikki um kvøldið og sunnudag.
Løn eftir avtalu.

Áhugað verða biðin um at venda sær til Jørgen Jørgensen á tel 21 74 04 ella á jorgen@jyde.dk

MIKLAGARÐUR






## Skrivstovufólk/Starvsfólk

**Av tí at øktar uppgávur eru á útbreiðsludeildini, er eitt áhugavert starv hjá okkum leyst at søkja**

**Høvuðsuppgávur:**
- Haldaratænastan
- Samskifti við starvsfólkið kring landið
- Postgreiðsla/Telefongreiðsla
- Vanligt skrivstovuhald

**Førleikakrøv:**

**Vit vænta, at tú hevur viðkomandi royndir:**
- Skrivstovukunnleika
- Kunnleika í nýtslu av teldu
- Fyrikomandi og góð samstarvsevni
- Førleika til at arbeiða sjálvstøðugt
- Koyrikort

– og dugir at arbeiða í einum umhvørvi, har úrslit, tænasta og deadline eru lyklaorð.

Setanar- og lønartreytir verða sambært avtalu, og starvið verður at seta skjótast til ber. Tó bíða vit fegin eftir rætta viðkomandi.

**Umsókn:**

**Umsókn við prógvum o.ø. skal sendast til:**
Prentmiðstøðin
Mrk.: Umsókn
Postboks 3314
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 28. apríl 2008.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Hallstein Sigurðsson, samskipara, á telefon 564600

P/F Prentmiðstøðin varð stovnað á sumri 2000, tá Dimmalætting og Sosialurin løgdu blaðprentsmiðjur sínar saman.
Endamál felagsins er at prenta bløð umframt at bera bløð út.
Í løtuni prentar felagið tey flestu bløðini, sum koma út í Føroyum, og stendur harafturat fyri flutningi og útbering av Dimmalætting og Sosialinum fimm ferðir um vikuna. Vit bera eisini reklamur til hvørt húsarhald .

**Prentmiðstøðin**